# Bygnaðurin á Listasavnin

**Landið kann ikki rinda fyri raksturin á Listasavninum og ikki hava ávirkan á tað, heldur Tróndur Patursson. Hann heldur tað vera alneyðugt, at tann politiski myndugleikin leggur upp, og broytir viðtøkurnar fyri savnið. Fyrst í nítiárunum varð bygnaðurin á savninum umskipaður, men Tróndur Patursson heldur tað ikki vera rætt, at ein sjálvsognarstovnur skal umsita landsins ognir. Eisini fýlist hann á samansetingina av nevndini fyri Listasavn Føroya**



*Listamaðurin Tróndur Patursson heldur, at tað kann ikki vera rætt, at landið rindar fyri Listasavnið, men hevur onga ávirkan á tað. Harafturat metir hann ikki samansetingina í nevndini fyri savnið vera í lagi*

ein mannarættur. Men um ein skal sýna fram alment er man noyddur at fyrihalda seg til heimslistina, sigur Tróndur Patursson, og leggur afturat, hetta ikki er ein serføroyskur trupulleiki, tí eitt nú í Danmark hava tey Per Kirkeby, og har finnast 50 kopi av honum, sum hann tekur til.

– Ein listaskúli má liggja, har stór søvn liggja. So sjálvandi er París tað allarbesta. Øll sum fáast við list áttu at fingið eitt spark í reyvina og farið uttanlands burtur frá húðaskógvamentanini. Hví búði Mikines í Danmark? Hann fekk einki mótspæl í Føroyum, men gjørdi tó føroyskar myndir alt lívið. Man kann siga um Ingálv og onnur, at høvdu ferðamøguleikarnir ikki verið so góðir, høvdu tey helst búð aðrastaðni, men hetta kundi verið øðrvísi, heldur Tróndur Patursson

LIST

*Orð/mynd: Theodor E. D. Olsen*

Tann 26. januar í ár sendu tey 12 listafólkini, sum í fjør tóku seg úr felagnum Føroysk Myndlistafólk eitt skriv til nevndina fyri Listasavn Føroya, og tað varð eisini sent fjølmiðlunum.

Har heittu tey á nevndina fyri Listasavn Føroya um ikki at seta núverandi savnsleiðaran, Helga Fossádal, sum ikki er listfrøðingur, í fast starv, nú eitt árs royndartíð hansara gongur út 1. mars. Tey mótmæla eisini, at ein listfrøðingur ikki verður settur, og kalla tað eina neyðloysn, at ein persónur, ið ikki er listfrøðingur, er settur at røkja hesa uppgávu í bert tríggjar mánaðir um árið. Harafturat verður funnist at, at hetta starvið ikki er lýst leyst.

Tróndur Patursson er eitt av teimum tólv professionellu listafólkunum, sum í fjør tóku seg úr felagnum Føroysk Myndlistafólk, av tí tey sum yrkislistafólk ikki hildu seg vera nóg væl umboðað í felagnum, og sum hava mótmælt, at ein listfrøðingur ikki varð settur í starvið sum leiðari í Listasavni Føroya.

Hann heldur, at politiski myndugleikin átti at lagt upp í og broytt lógargrundarlagið fyri Listasavnið, so at tað ikki longur var ein sjálvsognarstovnur.

Men spurdur um hví hesin bólkurin av yrkislistafólkum júst nú hevur tikið seg úr áðurnevnda felag og funnist at vantandi pappírunum hjá núverandi savnsleiðara, sigur Tróndur Patursson, at tey fyrstu árini tók Janus Kamban, sum er útbúgvin listamaður, sær av listasavninum, eftir at nøkur fólk høvdu tikið seg saman og bygt tað.

– Hann gjørdi hetta arbeiði fyri lítið og einki, og hann legði sítt lív til fyri dygdina í listini, sigur Tróndur Patursson.

Eftir Janus Kamban tók Bárður Jákupsson við, sum umframt at hava eina akademiska útbúgving sum listamaður eisini er útbúgvin lærari og hevur námsfrøðiligt prógv.

– Sjálvandi skuldi ein listfrøðingur verið settur beinanvegin, men eingin var tøkur. Sjálvandi var best við fleiri fólki, men hetta kostar pengar, og teir eru ikki til staðar, sigur Tróndur Patursson, ið tó metir førleikarnar hjá teimum báðum undanfarnu vera rímiligar fortreytir, sum hann tekur til.

## Tignin týdningarmikil

Tá Bárður Jákupsson síðani valdi at leggja frá sær, var tíðin tó komin at seta ein listfrøðing, metir Tróndur Patursson.

Hetta hendi sum kunnugt ikki. Táverandi formaður í stýrinum fyri Listasavnið, Gunnar Hoydal, mótmælti, núverandi leiðaran, sum ikki er listfrøðingur, varð settur, men valdi at siga seg úr formanssessinum, tá hansara sjónarmið ikki vunnu frama.

Tróndur Patursson leggur dent á, at hann metir tað vera sera umráðandi ikki at gera hetta til eitt persónsstríð, men heldur at hyggja eftir teimum fakligu perspektivunum og førleikunum í hesum málinum. Tí sum hann tekur til, so er tað umráðandi at tað er ein listfrøðingur, ið leggur leiðina fyri savnið, tvs. skipar fyri framsýningum, keypir list og annars avger, hvat játtanin skal brúkast til. Tróndur Patursson greiðir frá, at á stórum listasøvnum eru tað ofta tveir stjórar, har annar tekur sær av tí umsitingarliga og hin av tí listaliga.

– Men tað er altíð listfrøðingurin, sum myndar savnið, sigur Tróndur Patursson, ið ikki sigur seg vita um nakað annað tjóðarsavn, sum hann kallar tað, ella listasavn á okkara leiðum, ið ikki hevur ein listfrøðing í starvi, sum myndar savnið.

– Størsta uppgávan hjá einum tjóðarsavni er at sýna fram. Næsta uppgávan er at keypa inn tað allarbesta, ið verður skapt í Føroyum. Triðja uppgávan er at hava so gott samband við útheimin sum gjørligt, soleiðis at góðar framsýningar úr útlondum koma hendanvegin. Her er tað umráðandi við tignini hjá einum savni. Man kann ikki selja bayerskar pylsur og Hereford-búffar á sama staði. Tað eru alt ov nógvar vánaligar framsýningar í Listaskálanum. Várframsýning, summarframsýning og ólavsøkuframsýning. Tað er ikki uppgávan hjá Listasavninum at gera so nógvar framsýningar sum gjørligt, men heldur framsýningar, har dygd er í. Vit áttu heldur at havt tríggjarfýra framsýningar, sum hava altjóða støði. Tað eru altíð tey somu, sum sýna fram, men aðrastaðni roynir man ikki at framsýna tær somu myndirnar í sama býi, men flytir við teimum, sigur Tróndur Patursson, ið eisini ávarar ímóti, at bara at fokusera upp á tað føroyska í listini.

– Føroysk list er ikki so serlig, at vit bara kunnu siga, at hetta er føroysk list. Siga vit tað, er tað húðaskógvamentan, tí tað er altíð neyðugt at samanlíkna seg við útheimin og ikki seg sjálvan. Eg sýni ofta fram saman við listafólkum úr øðrum londum, eitt nú í Danmark. Men í Danmark til dømis er man deyðatroyttur av hesum føroysku framsýningunum, sigur Tróndur Patursson, ið sipar til framsýningar, har bara føroyingar sýna føroyska list saman.

– Ein og hvør kann arbeiða við list, tí tað er

## Listasavnið ov kommersielt

Spurdur um vit eru í ferð at skapa eitt slag av nationalari list, sigur Tróndur Patursson, at t.d. Mikines og Ingálvur av Reyni ikki høvdu fyri eyga, at teirra list skuldi vera føroysk. Men hon kann tó vera vorðin føroysk, av tí at teir fyrst og fremst settu dygdi í hásæti.

Tróndur Patursson sigur, at í kreppuárunum mundi listin vera tann, ið eina mest helt okkum uppi og styrkti samleikan hja okkum.

– Nøkur av okkara bestu listafólkum búgva uttanlands. Um tey skulu tíma heim aftur og sýna fram her aftur, skulu vit taka dygdina í álvara, og ikki bara hugsa um at selja. Man ger jú framsýningar, ið selja, tí so fær Listasavnið prosentir, sigur Tróndur Patursson, og heldur at Listasavnið í alt ov stóran mun hevur hugsað kommersielt, heldur enn at raðfest dygdina.

Spurdur, um hann ikki heldur eitt nú framsýningar við t.d. Munch og Mikines tað seinasta árið hava verið á høgum listaligum støði, svarar Tróndur Patursson tó játtandi, og leggur aftrar,